Góðu foreldur og avvarðandi hjá næmingum í 9.flokki

Seinasti skúladagur hjá næmingunum í 9.flokki nærkast í hvørjum, og hesa tíðina á hvørjum ári verður tosað aftur og fram um, hvussu hetta verður skipað. Næmingarnir gleða seg til dagin, og tað gera vit í skúlanum eisini, tí dagurin plagar at vera bæði stuttligur og hugnaligur.

Siðvenjurnar á skúlunum eru ymiskar, og ymiskt er, hvat skúlarnir bjóða næmingunum henda seinasta skúladagin. Men endamálið hjá øllum skúlunum í kommununi er altíð, at hava eina góðan og hugnaligan dag, har vit uppliva næmingarnar og eru saman við teimum í øðrvísi kørmum enn vanligt.

Seinastu árini hava vit tó lagt til merkis, at næmingarnir hava ikki ordiliga tíð at dvølja í samveruni í skúlanum, tí tey skulu víðari í leigað høli, sum eru trupul at fáa fatur í og kostnaðarmikil. Eitt annað hevur verið eitt bál í Sandagerði.

Síðsti skúladagur í ár er 13.mai, tá fáa vit at vita hvørjar lærugreinar 9. fl skal upp í.

12. Mai skipar 9. fl fyri einum øðrvísi skúladegi fyri lærarum og næmingunum á skúlanum. Dagurin endar við einari rúsfríari veitslu um kvøldi, og vit á skúlanum vilja geva næmingunum møguleika at hava endaveitsluna á skúlanum. Hetta er tó treytað av, at foreldur skipa fyri veitslunini saman við næmingunum, at foreldur eru til staðar meðan veitsla er og at veitslan er rúsfrí.

Undanfarin ár hevur verið eitt bál í Sandagerði, sum "eingin" hevur ábyrgd av. Tað hava skúlarnir saman við SSP havt eitt ynski um at broyta. Í fjør og fyrraárið var einki bál, og heldur ikki í ár verður nakað skipað bál í Sandagerði. Tað eru myndugleikarnir, Tórshavnar kommuna saman við SSP og skúlarnir í kommununi samdir um. Tað ber ikki til at tendra stórt bál, og ongan ábyrgdara at hava.

Skúlarnir og SSP vóna, at við stuttligum skúladegi og góðari veitslu, seta vit fokus á tann góða felagsskapin uttan rús.

Vit ynskja, at tit foreldur stuðla okkum. Tað gera tit við at stuðla okkum í avgerðini og við at hjálpa við t.d. at fáa eina tónleikaframførslu ella annað undirhald til veitsluna hjá næmingunum 12.mai.

Blíðar heilsanir

Skúlaleiðslan og SSP umboðini í skúlunum í Tórshavnar Kommunu